2017 - 2020

# Tórshavn sum ferðavinnubýur




Ferðavinnupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu

# Tilmæli um átøk 2017-2020

Ferðavinnan verður ofta umrødd sum ein tann størsta vinnan í heiminum, og gongdin er sambært United Nations World Tourism Organization (UN-WTO) vaksandi á altjóða stigi við fleiri og fleiri veitarum, ið kappast um tey somu ferðafólkini. Visit Faroe Islands setti sum mál í 2012 at tvífalda talið av ferðafólki frá 100.000 í 2012 til 200.000 í 2020, og sæst longu nú, at úrslitini av miðvísu marknaðarføringini hjá Visit Faroe Islands hava megnað at seta Føroyar á heimskortið. Ferðafólkastreymurin til Føroya er vaksandi ár undan ári, ferðafólk gerast alsamt meiri sjónlig í Føroyum, og bæði ferðafólkatal og umsetningur vaksa støðugt. Ferðavinnan hevur stórt búskaparligt virði og skapar nýggj arbeiðspláss, nýggj størv og nýggjar tænastur og møguleikar, sum eisini koma borgarum til góðar.

Tórshavnar kommuna er tann kommunan í landinum, sum tekur ímóti flest ferðafólkum. Tí er tað týdningarmikið sum høvuðsstaður at veita røttu karmarnar, soleiðis at ferðavinnan støðugt kann mennast og gerast ein natúrligur partur av kommununi. Tórshavn sum miðstaðarøki eigur at ganga á odda, tá ið tað snýr seg um menning av ferðavinnu. Endamálið hjá kommununi er at skapa eina burðardygga ferðavinnu, soleiðis at vit tryggja eitt kappingarført ferðamál, eisini í framtíðini. Hetta krevur fyrst og fremst eina skipaða ferðavinnu. Menning av eini greiðari skipan og betri ráðlegging tryggja, at ferðamálið er til reiðar at lofta vaksandi ferðafólkatalinum og teimum krøvum og avbjóðingum, sum fylgja við. Við góðum leiðreglum kann ferðavinnan í Tórshavnar kommunu mennast á ein hátt, har tað slepst undan sosialum og mentanarligum tvístøðum, og soleiðis at hon skapar virði bæði fyri vinnu, samfelag og borgarar. Kappingin um ferðafólkini er hørð, og tí er tað umráðandi at veita ferðafólkunum best møguligu upplivingina, samstundis sum hugsað verður um tey árin, vaksandi ferðavinna kann hava á samfelagið og umhvørvið.

Tórshavnar kommuna sær virðið í vaksandi ferðavinnuni, men heldur enn at síggja virðið í øktum vavi av ferðafólki skal áherðsla leggjast á at fáa tey ferðafólkini til Føroya, sum skapa eitt jaligt virði. Við at skipa ferðavinnuna, meðan hon enn er á byrjanarstigi, hevur Tórshavnar kommuna fyrimunin at kunna tryggja atgongd til neyðuga vitan og tilfeingi, soleiðis at tað gerst lættari at lofta ella síggja fyri sær teir trupulleikar, sum kunnu koma fyri. Verður ikki arbeitt tilvitað við ferðavinnumenning, kann tað føra við sær bæði dýrari og tyngri uppgávur, og viðvíkjandi náttúrutilfeingi kann tað verða ov seint, soleiðis at ikki allir skaðar kunnu bøtast. Í fyrstu atløgu er tað umráðandi, at kommunan kennir sína styrki og sínar avbjóðingar og setur átøk íverk til framhaldandi menning. Fyrsta stigið í kommunalu ferðavinnuraðfestingini er tí at orða ein politikk á økinum.

Endamálið við politikkinum er at skapa neyðugar fortreytir fyri, at ferðavinnan kann mennast burðardygt, soleiðis at størst møguligir ágóðar fáast av ferðavinnuni, uttan at hon er til ampa fyri borgarar og umhvørvi. Av tí at eingin politikkur áður hevur verið fyri ferðavinnuna í kommununi, eru tað ávís grundleggjandi viðurskifti, sum í fyrstu syftu eru neyðug at viðgera. Ferðavinnan fevnir sera breitt, og tí er neyðugt at gera nakrar avmarkingar. Hesin politikkur loysir tí ikki allar trupulleikar, men skal síggjast sum fyrsta stigið til víðari menning. 23 tilmæli fyri 2017-2020 eru raðfest, sum fevna um átøk, sum kunnu føra til eina mennandi og burðadygga ferðavinnu fyri bæði ferðafólk, borgarar, kommunu og Føroyar sum heild. Politikkurin er eitt virkið tól, sum javnan verður dagført, við tí fyri eyga at halda eitt vakið eyga við ferðavinnuni og fylgja rákinum, soleiðis at neyðug átøk kunnu setast í verk so hvørt.



# Yvirlit yvir tilmælir

Tilmælini, sum eru raðfest í ferðavinnupolitikkinum, fevna um tær avbjóðingar, sum bæði vinna, ferðafólk, borgarar og serkøn innan ferðavinnu hava gjørt vart við. Endamálið við at leggja áherðslu á júst hesi tilmæli er grundað á, at mett verður, at hesi fevna um átøk, sum eru mest átrokandi til at bøta um tær avbjóðingar, sum longu eru, og sum kunnu vera eitt fet á leiðini til eina gevandi og burðadygga ferðavinnu, væl vitandi, at tað eru onnur átøk, sum eisini kundu verið sett í verk.

1. Ferðavinnan í lágárstíð
2. Kampingvinnan
3. Cruise-vinnan skipast betur
4. Vitan um ferðafólkini
5. Menning og marknaðarføring av nissjuferðavinnu
6. MICE-ferðavinna
7. Visit Tórshavn – umskipast og styrkjast
8. Tættari samstarv við vinnu og borgarar
9. Branding av Tórshavn sum høvuðsstaður og ferðavinnubýur
10. Talgild kunning
11. Innlendis ferðing og bílegging
12. Skelting
13. Útsýnisstøð – viewpoints
14. Kort og faldarar
15. Bussleiðin
16. Atkoma fyri øll
17. Menning av økjum í kommununi innan ferðavinnu
18. Viðlíkahald og trygd í náttúruni
19. Ferðavinna úti á Reyni
20. Almennir hentleikar
21. Mentan í fokus
22. Matmentan
23. Tiltøk – events

**Arbeiðsbólkur**

Súsanna Laursen

Jónhild Rasmussen

Theresa Turiðardóttir Kreutzman

Annfinn Hjelm

Hanna Simonsen

1



# Ferðavinnan í lágárstíð

Ferðavinnan í Føroyum er serliga sjónlig í háárstíðini. Hetta er ikki eitt fyribrigdi, sum er serstakt fyri Føroyar, men er eitt fokusøki hjá nógvum ferðamálum, ið royna at leingja um háárstíðina. Tórshavnar kommuna vil virka fyri, at røttu karmarnir eru til at menna eina heilársferðavinnu. Hetta verður gjørt millum annað við at skipa fyri tiltøkum uttan fyri háarstíðina. Eitt av hesum tiltøkum er MICE, sum kommunan er ein partur av (sí tilmæli nr. 6). Miðast skal ímóti at skapa eina ferðavinnu, sum fevnir um alt árið, og sum er við til at menna eina burðardygga ferðavinnu.

Við at marknaðarføra kommununa uttan fyri háárstíð kunnu vit fáa eina javnari ferðavinnu alt árið, og tað kann vera við til at gera hana burðardygga, bæði fíggjarliga, sosialt og í mun til náttúruna. Hetta kann gerast við at arbeiða miðvíst við MICE umframt at gera átøk við myndum og greinum á sosialu miðlunum um tilboð, veðurlag, hugna og annað, ið vit hava at bjóða alt árið.



2

# Kampingvinnan

Kampingøkið Yviri við Strond er nú so væl skipað, at mælt verður til, at kommunan kannar møguleikan fyri at bjóða kampingøkið út.Tað er stórt virði í at hava eitt kampingøki, men tað er ikki ein grundleggjandi kommunal uppgáva at standa fyri rakstrinum og menningini av gistingarútboðnum í kommununi. Í samsvari við vaksandi ferðavinnuna er neyðugt at kanna, um tørvur er á fleiri kampingøkjum í Tórshavn.



3

# Cruise-vinnan skipast betur

Í sambandi við at kommunan ynskir at menna eina burðardyggari ferðavinnu, er neyðugt at gera eina strategi fyri cruise-vinnuna í Tórshavnar kommunu og hvussu hendan vinnan skal mennast frameftir. Hvussu tekur høvuðsstaðurin best ímóti gestum frá ferðamannaskipum, og hvussu skulu tilboð og tænastur til hesar gestir mennast, soleiðis at ein fíggjarligur vøkstur sæst aftur í keypi av vørum og tænastum.

4

# Vitan um ferðafólkini

Tilmælið er at halda áfram við at gera segmenteringskanningar, sum lýsa, hvørji ferðafólk vitja í Føroyum. Á sama hátt sum vit mennast sum ferðamannaland og okkara „brand“ kemur meira út í heim, líka so nógv broytist samansetingin av ferðafólkunum. Har Føroyar áður hava havt vitjan av einum smølum málbólki av entusiastum, eru Føroyar alsamt vorðnar meiri atkomuligar við øktum ferðasambandi og lagaligari prísum. Tískil er neyðugt at halda okkum dagførd við, hvussu ferðafólkasamansetingin sær út, og vera før fyri at nøkta tørvin á bestan hátt og tillaga tænastur og marknaðarføringina, soleiðis at hesar altíð samsvara við teir málbólkar, sum vitja Føroyar.

Mælt verður til, at Visit Tórshavn áhaldandi ger kanningararbeiði um ferðafólkini, millum annað um teirra ynskir, vónir og væntanir. Við hesari vitan ber til hjá vinnuni at tillaga upplivingartilboð og hjá Visit Tórshavn at gera miðvísa marknaðarføring og tænastur. Rákið innan ferðavinnu skiftir alsamt, og tí er hetta arbeiði sera umráðandi. Hetta skal gerast í samráð við Visit Faroe Islands og onnur viðkomandi, sum virka í vinnuni.



# Menning og marknaðarføring av nissjuferðavinnu

Nissja er eitt serligt áhugamál. Í ferðavinnuhøpi stendur tað serliga í andsøgn til hópferðavinnu. Fólk ferðast til økir, ið kunnu bjóða teimum upplivingar júst innan teirra áhugamál. Tað kann vera náttúra, fuglafrøði, fisking, matlist og so framvegis. Kannast skal, hvørjir eyðsæddir nissjumálbólkar hóska til ymisku økini í kommununi, og marknaðarføringin tillagast, so hon passar til einstøku málbólkarnar, til dømis brúdleypsferðavinna, matferðavinna, serligar náttúruupplivingar o.s.fr.

5




# MICE-ferðavinna

MICE (Meetings, Incentives, Conferences, Events), sum eisini kallast vinnuferðavinna, fevnir um fundir, virkisferðir, ráðstevnur og tiltøk, sum millum annað krevja gistingarhús, ráðstevnuhøli, vistveitarar, privatar ferðavinnuveitarar og lokal ferðavinnuráð.

Kommunan skal gera eina skipan, ið fevnir um, hvussu MICE skal leggjast til rættis. Tá eitt MICE tiltak er í býnum, er tað av stórum týdningi, at øll veitingarketan er til reiðar til tess. Tískil verður mælt til, at ein bólkur verður stovnaður, sum fevnir um alla vinnuna t.v.s. handlar, ferðaskrivstovur, hýruvognsstøðir, gistingarhús, matstovur o.s.fr. Á henda hátt, kunnu øll fyrireika seg og hava eyka starvsfólk, tá nógv ferðafólk væntast í býnum. Eisini verður mælt til at nýta skelting at vísa á, at vit bjóða gestunum vælkomnum.

Umframt hetta verður mælt til, at ein faldari verður gjørdur, sum kommunan kann bjóða gestunum. Hesin faldarin skal sniðgevast av ungum føroyskum listafólkum. Faldarin skal vísa á mentan og søgu í Tórshavn og kunna um tænastur og møguleikar, sum eru í býnum.

Kommunan vil sum luttakari í MICE samstarvinum eisini skipa fyri móttøkum, tá ráðstevnur eru í býnum. Ein reglugerð er gjørd hesum viðvíkjandi.

7

# Visit Tórshavn – umskipast og styrkjast





Til tess at nøkta framtíðar tørvin hjá ferðafólkum eigur áherðslan at liggja á menning, kunning, marknaðarføring og tænastu til ferðafólk, og neyðugt er at broyta bygnaðin og endamálsorðingina fyri Visit Tórshavn. Eisini er neyðugt at umraðfesta verandi uppgávur, soleiðis at størri dentur verður lagdur á menning, kunning, marknaðarføring og tænastu enn í dag, og at bygnaðurin verður skipaður eftir einum „DMO leisti“ (Destination Management Organization). Visit Tórshavn, sum kunningarstova skal leggja upp til og virka sum snúningsdepil fyri samstarv við kommunur, almennar stovnar, vinnu og borgarar.



8

# Tættari samstarv við vinnu og borgarar

Samskifti millum ferðafólk, veitarar og íbúgvar er ein stórur partur av ferðavinnuni. Stuðla vinnan ella borgarar ikki upp undir ferðavinnu, eru líkindi fyri, at hetta kann koma til sjóndar hjá ferðafólkunum, og kann tað hava við sær, at tey ikki viðmæla øðrum at ferðast til Føroya, ella sjálvi ikki ynskja at venda aftur. Tórshavnar kommuna ynskir at menna eina ferðavinnu, sum borgarar og vinna kunnu liva av, men eisini liva við.

**BORGARAR:**
Visit Tórshavn skal regluliga hava samskifti við borgarar á støðum, har nógv ferðafólk vitja, eitt nú úti á Reyni. Eitt umboð skal finnast, sum borgarar kunnu venda sær til og sum samskiftir við Visit Tórshavn. Umboðið kann altíð seta seg í samband við Visit Tórshavn, soleiðis at arbeitt verður proaktivt, og Visit Tórshavn fær høvi at kunna um, hvat er fyri framman. Visit Tórshavn skal kalla inn til borgarafundir, soleiðis at øll fáa høvi at hava sína ávirkan. Her fær Visit Tórshavn høvi at samskifta beinleiðis við borgarar, sum best vita, hvat hendir á júst teirra øki. Tað er soleiðis, at Visit Tórshavn kann fáa vitan um, hvat hendir í kommununi og fáa borgarar til at vera viðspælarar og koma við hugskotum um, hvat kann gerast betur.

**VINNAN:**
Kommunan saman við Visit Tórshavn skulu skipa fyri skeiðum ella verkstovum, har øll áhugaði innan ferðavinnu eru vælkomin at luttaka. Her verða ymisk evni viðgjørd, til dømis trygd, tænasta, o.s.fr. Endamálið er at menna og kunna vinnuna og tey fólk, sum beinleiðis hava við ferðafólk at gera, t.d. hýruvognsførarar, tænarar, upplivingaveitarar o.s.fr. Hetta er nakað, sum er vanligt í okkara grannalondum, og sum eisini hevði lyft ferðavinnutænastustigið í kommununi.


TOGA

Eitt „brand“ skal gerast fyri Tórshavn sum høvuðsstaður og ferðamál. Ein samleiki skal skapast, sum skal nýtast í marknaðarføringini av Tórshavn, í tøttum samstarvi við Visit Faroe Islands og veitarar í vinnuni. Felags visjón og missión fyri ferðavinnuna í Tórshavnar kommunu skal orðast, soleiðis at kós (rætningur) og átøk, sum stuðla undir eina burðardyggari ferðavinnu, verða ment í samstarvi við vinnuna.

**MARKNAÐARSTRATEGI:**

Tilmælið er at leggja serligan dent á teir málbólkar (segment), sum longu vitja Føroyar. Eitt marknaðar-konsept skal mennast, sum fylgir tí nýggja brandinum, og skal nýtast miðvíst í sambandi við teir ymisku málbólkarnar. Pallar og heimasíður skulu mennast og dagførast, og teir sosialu miðlarnir skulu styrkjast og nýtast virkið í marknaðarføringini.

**PRODUKTSTRATEGI:**

Tilmælið er at eyðmerkja øll merkisstøð í Tórshavn og øki, sum hoyra til Tórshavnar kommunu, at savna øll merkisstøð, tiltøk, tænastur, vørur og veitingar á einum ‘online’-stað og at menna og seta pakkar saman við veitarum, sum hóska til tey ymisku segmentini. Endamálið er, at ferðafólk lættari skulu fáa eyga á teir ymisku møguleikarnar og tilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, og at gera hesi meiri áhugaverd bæði fyri ferðafólk og borgarar.



# Branding av Tórshavn sum høvuðsstaður og ferðavinnubýur



10

# Talgild kunning

Tað er á Visit Tórshavn, at flestu ferðafólk leita sær kunning. Tørvurin er stórur, og ferðafólk koma á gátt at spyrja um mangt og hvat. Visit Tórshavn skal framhaldandi standa fyri kunningarpartinum í kommununi, og týdningarmikið er við nøktandi upplatingartíðum og hollum kunnleika hjá starvsfólkum innan kunningarpartin. Tað er umráðandi, at hesin partur verður raðfestur, tí tað er hetta samskiftið við kundan, sum kann vera avgerandi fyri upplivingina og fyri, hvussu nógvan pening ferðafólkini leggja eftir seg.

**KJATTFUNKTIÓN:**
Kunningin skal vera í hásæti og lætt atkomulig. Vit skulu hitta kundan bæði á staðnum og talgilt. Her verður mælt til, at ferðafólk, umframt at kunna leita sær kunning við diskarnar, eisini kunnu samskifta við starvsfólk á Visit Tórshavn á heimasíðuni. Ein møguleiki er ein kjatt-funktión, so ferðandi lættliga kunnu seta starvsfólkunum á Visit Tórshavn spurningar. Hetta er við til at lyfta tænastustigið munandi. Henda loysn hevði eisini tikið ein part av trýstinum á kunningardiskin á Visit Tórshavn, har bíðirøðin ofta er long.

**KUNNINGARSKÍGGJAR:**
Í okkara grannalondum sæst, at nógv økir hava sett upp kunningarskíggjar á ymiskum støðum, har nógv fólk vitja. Henda loysn hevði somuleiðis ment kunningarpartin í kommununi. Kunningarskíggjar kundu verið settir upp, har nógv ferðafólk savnast, t.d. á gistingarhúsum, farstøð o.s.fr.

Kunningin verður stýrd frá Visit Tórshavn, har kunning um tiltøk og ymiskar viðkomandi upplýsingar eru at síggja.

**DAGFØRDAR HEIMASÍÐUR:**
Tað er av alstórum týdningi, at Visit Tórshavn hevur eina dagførda talgilda loysn t.v.s. heimasíðu við øllum upplýsingum við m.a. Whats On, Facebook og Instagram. Mælt verður til, at upplivingarveitarar og onnur í ferðavinnuni eisini hava dagførdar heimasíður við møguleika fyri talgildari bílegging og sum eru á øðrum málum enn føroyskum.

**HOTSPOTS:**
Skulu ferðafólk kunna nýta samskiftismøguleikarnar á netinum, er týdningarmikið, at tey hava atgongd til alnetið. Føroya Tele og Hey hava í størri og størri mun útbygt sínar „roaming"-avtalur við útlendskar veitarar, so nógv ferðafólk kunnu nýta sína egnu fartelefon á føroyska fartelefonnetinum, men tó ikki øll. Tískil er tørvur á einari ætlan at økja um frí wifi-hotspots í Tórshavnar kommunu. Tað eru fleiri hættir at samskipa hetta, t.d. kann ein stórur partur av fígging og viðlíkahaldi av hesum koma frá lýsingasølu, har føroyskir veitarar fáa loyvi at hava kunning á byrjanarsíðuni á wifi-hotspottinum. Hetta má samskipast við føroyskar internet-veitarar, og avtala gerast um viðlíkahald.

Uttanlands eru wifi-hotspots sett upp á sentralum økjum, har fólk savnast. Her kundu Trappan í Vágsbotni ella Vaglið verið sjálvsøgd støð, har fólk kundu nýtt frítt wifi. Hetta hevði savnað nógv fólk saman og skapt lív í býnum.

# Innlendis ferðing og bílegging

Vitjandi, sum koma flogvegis, hava møguleika at koma til og frá flogvøllinum við hýru-vogni ella Bygdaleiðir. Bygdaleiðir eru tó ikki tengdar at flogrutuni, og hetta ger, at fólk ofta mugu bíða í Vágum eftir næsta bussi. Tað hevði gjørt upplivingina munandi betri og lættari fyri ferðafólk og føroyingar, um møguligt var at bíleggja og leggja ferðina til rættis frammanundan.

Sum eisini verður skotið upp í álitinum frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (2017), er ynskið somuleiðis, at Strandferðslan mennir eina talgilda bíleggingarskipan, har kundar kunnu bíleggja, leggja til rættis og gjalda ferðina í góðari tíð, samstundis sum ferðslan verður betur skipað í sambandi við fráferðir og komur á flogvøllinum.



11


Norðradalur
18V



12

# Skelting

Nógvar kanningar um ferðafólkamynstur vísa á, at ferðafólk ofta ilskast um, at tey villast ella finna ikki tað, tey leita eftir.

Sambært ferðafólkakanningini (2016) er hetta eisini galdandi fyri tey ferðafólk, sum vitja Tórshavnar kommunu. Tað var torført hjá ferðafólki at finna til dømis kunningarstovuna, SMS, gistingarhús og apotek, og sum heild var torført at finna veg í og úr miðstaðarøkinum. Samrøður við veitarar í vinnuni staðfesta somuleiðis, at stórur tørvur er á skelting við atliti til ferðafólk í kommununi.

Hinvegin eru eisini nógv ferðafólk, sum í dag ferðast við hugburðinum „get lost", tí alt gerst meiri atkomuligt við tøknini og alnetinum, og her kunnu vit skilja okkum burtur úr øðrum býum. Skeltingin skal tí vísa eitt lætt og greitt yvirlit yvir býin, sum er høvuðsendamálið við skeltingini. Skeltingin skal vera sera gjøgnumhugsað og ikki órógva tað autentiska í kommununi. Kommunan arbeiðir við Smart City (tøkni), og her er sjálvsagt, at ferðavinnan verður hugsað inn í hesa skipan, soleiðis at skeltingin ikki einans verður tann siðbundna skeltingin, men eisini er samvirkin (interaktiv).

Ein skeltingarætlan innan ferðavinnu skal gerast í kommununi. Hetta er av stórum týdningi og fer at lyfta ferðavinnutænastustigið munandi. Tó skulu skeltini gerast á ein hátt, sum ikki órógvar býarmyndina, og hugsast skal um at varðveita eina javnvág millum tað autentiska og tað mest neyðuga, har skeltingin er upplýsandi bæði á føroyskum og enskum. Skeltingin fyri ferðavinnuna skal koma inn sum ein partur av eini størri skeltingarætlan í kommununi. Hetta skal gerast bæði fysiskt og talgilt.



13

# Útsýnisstøð – viewpoints

Sambært vinnuni eiga ymiskar ábøtur at verða gjørdar á útsýnisstøðini (viewpoints) í kommununi. Ítøkilig dømi eru:

Betri, størri og fleiri støð við góðum útsýni, sonevnd 'viewpoints', fram við vegunum. Eitt nú á Oyggjarvegnum mugu fleiri ábøtur gerast:

Við Hundsenni (t.e. oman fyri Kollafjørð, asfalterast og slættast)
Á Norðadalsskarði (gerast størri og asfalterast)
Norðan fyri Mjørkadal, viewpoint Kaldbaksfjørður (gerast størri og asfalterast)
Oman fyri Havnina (asfalterast og gerast størri)
Við Hotel Føroyar (gerast størri)



# Kort og faldarar

Samstundis sum skeltingin ikki er nøktandi, er tørvur á betri býarkortum, sum geva eitt lætt og greitt yvirlit yvir býin. Skal kunningin vera í hásæti, er neyðugt við einum korti við væl uppmerktum gøtum, merkisstøðum (attraktiónum), skeltum og líknandi. Kortið má vera lætt at lesa við stórum bókstavum, samstundis sum tað er sniðgivið til nýmótans ferðandi við íblástri frá núverandi kortum hjá Visit Copenhagen. Eitt klárt samspæl skal vera millum nýggj býarkort og skeltingina, og fer hetta at minka um tørvin á kunning við kunningardiskarnar og í síðsta enda gera upplivingina av at ferðast í býnum betri og lættari.

Mælt verður til at gera eitt býarkort. Kortið vísir eitt yvirlit yvir allar attraktiónir í Havnini og somuleiðis gøtur. Hetta hevði gjørt, at ferðafólk vórðu meira spjadd og kundu farið eftir júst teirra áhugamálum. Møguleiki er at býta kortini upp í evnir sum t.d. mentan, náttúruøkir og gøtur, og eitt býarkort.

Eisini verður mælt til, at ein faldari verður gjørdir um tættbygd økir, har nógv ferðafólk vitja. Nógv ferðafólk ganga á hesum økjum, millum annað úti á Reyni og í Kirkjubø, soleiðis at hetta ikki skal vera til ampa fyri fólkini, sum búgva á staðnum. Faldarin skal siga søguna um býlingin og samstundis siga frá, hvussu ein skal bera seg at á tílíkum støðum. Umframt at gera kort í fysiskum formi er eisini týdningarmikið, at kortini eru talgild.

15

# Bussleiðin




Bussleiðin í kommununi er ókeypis hjá ferðafólki og øðrum at nýta. Hóast hetta er við til at skilja okkum frá øðrum ferðamálum og kann tykjast sum ein góð tænasta, er hetta ikki ein haldgóð loysn. Trýstið á bussleiðina um summarið er stórt, og hendingar hava verið, har borgarin, sum rindar fyri bussleiðina, ikki fær sitipláss og tískil ilskast inn á ferðafólkini. Ferðafólk kenna seg heldur ikki altíð væl við hesa støðu og hava ilt við at skilja, at júst tey sum ferðandi skulu ferðast ókeypis.

Eisini er ein trupulleiki, at ferðafólk nýta bussleiðina til beinleiðis „sightseiing". Hetta tekur inntøkur frá ferðaleiðarum, hýruvognsførarum o.fl.

Tá bussleiðin verður endurskoðað, verður mælt til, at hugsað verður um eina loysn, sum hevur ta vaksandi ferðavinnuna í huga, og at ferðafólk í framtíðini rinda eina ávísa upphædd fyri at nýta bussleiðina. Hetta kann skjótt gerast ein stór inntøka, sum kann fara beinleiðis aftur í ferðavinnuna.

Umráðandi er, at ein loysn verður funnin, sum ger tað lætt og skjótt at taka bussin, soleiðis at hetta ikki kemur at tarna ferðsluni.

Mælt verður til, at tíðirnar og leiðirnar verða dagførdar, soleiðis at lættari er hjá teimum, ið ikki hava bil. Koyrast skal seinni um kvøldið og eisini sunnudagar. Eisini verður mælt til, at farleiðirnar verða lættari at skilja, og at broytingar í ferðaætlanini gerast greiðari á føroyskum og á fremmandamálum.

# Atkoma fyri øll

Tað finnast ikki tøl fyri, hvussu nógv ferðafólk, sum bera brek, vitja Føroyar, tí eingi hagtøl eru um tað, og tí hevði verið ynskiligt at fingið hetta í lag. Visit Tórshavn hevur luttikið í einari norðurlendskari verkætlan um ferðafólk, sum bera brek. Hetta var eitt samstarv millum Ísland, Grønland og Føroyar – við iblástri frá Skotlandi og Kystnorge . Niðurstøðan av verkætlanini var, at vit eiga ikki at gera mun ímillum ferðafólk við breki  og onnur ferðafólk, og eigur hetta at síggjast aftur í øllum atkomuviðurskiftum. Arbeiðast skal tí við at gera vart við, at atkoma skal vera fyri øll uttan mun til førleikar. Atlit skulu takast til hesi viðurskifti í øllum verkætlanum í kommununi, og hetta økið er uppraðfest.



17





# Menning av økjum í kommununi innan ferðavinnu

Ymiskt er frá øki til øki, hvussu nógv ferðavinnan fyllir á núverandi stigi. Útjaðarin í kommununi hevur góðar vakstrarmøguleikar, tá tað snýr seg um ferðavinnumenning. Nólsoyggin, sum er Ramsar-oyggj, og Koltur, sum væntandi kemur á UNESCO heimsarvslistan, eru sjálvsøgd ferðamál. Kommunan arbeiðir við at gera bygdarætlanir við tí endamáli at kanna, hvat eyðkennir ymsu støðini og hvørjir møguleikar eru fyri menning í kommununi. Tó eru allar bygdirnar ikki við í hesum samstarvi, og mælt verður til, at allar bygdir í kommununi verða umboðaðar í hesi verkætlan.

Kommunan skal áhaldandi út á ymisku økini at halda borgarafundir og við støði í hesum gera eina ætlan fyri, hvussu økini hvørt sær skulu mennast, eisini í sambandi við ferðavinnu.

Kommunan er við til at seta átøk í verk, men síðani verða tað fólk á staðnum, sum standa fyri víðari menning, umsiting og framhaldandi rakstri av ferðavinnuvirkseminum á staðnum.

Tað hevur stóran týdning, at hvørt stað verður ment við ymiskum tilboðum og fær egnan samleika/brand, soleiðis at kommunan hevur fleiri upplivingartilboð fyri tey ymsu økini.

Øll økini í kommununi skulu raðfestast, soleiðis at øll hava neyðugar karmar innan ferðavinnumenning. Tørvur, ynski og møguleikar eru ymiskir frá staði til stað, og hesum skal hædd takast fyri, og kannast skal, hvørjar avbjóðingar og møguleikar eru fyri víðari menning. Mælt verður til at byrja við teimum økjum, har tað tykist at vera mest átrokandi, eitt nú úti á Reyni og í Kirkjubø, sum eru „must see“ økir í sambandi við ferðavinnu og uppliva tískil dagliga nógv ferðafólk. Út frá bygdarætlanum, ynski frá staðbundnu nevndunum og fólki á staðnum skal avgerast, hvussu og í hvønn mun ferðavinna skal mennast í einstaka økinum.

# Viðlíkahald og trygd í náttúruni



**TRYGD:**
Tað er ikki ókent, at vaksandi ferðavinna setur eyka krøv til trygdina á teimum ymisku økjunum. At ferðast í føroysku náttúruni kann vera vandamikið. Tað fara altíð at vera fólk, sum ikki vísa ávísingum ans, og henda part fáa vit ikki gjørt nakað við. Tað ber tó til, og er neyðugt, við kunning um, hvussu ein ber seg at í føroysku náttúruni. Kunnast skal á heimasíðuni hjá Visit Tórshavn, hvar fólk kunnu ganga sjálvi og hvar tað er tryggast við ferðaleiðara. Kunnast skal um, hvussu tú ber teg at í føroysku náttúruni og hvørji atlit skulu takast, til dømis viðvíkjandi veðrinum, brøttum bergum og hvussu neyðugt tað er at halda seg til gøturnar, bæði av trygdarávum, men eisini fyri at sleppa undan óneyðugum sliti.

**VÁÐAKENDAR UPPLIVINGAR:**
Seinastu árini hava vit sæð vaksandi eftirspurning eftir og útboð av upplivingum innan tað „ekstrema“ ella sonevnda váðakenda partin av upplivingum. Føroyska náttúran hóskar væl til hendan partin, og vit fara óivað at síggja meira til hetta virksemið í framtíðini. Hetta setur stór krøv til teir ferðasmiðir, sum bjóða út upplivingar innan váðaverk. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (2017) ynskja hesir ferðasmiðir, at teir kunnu góðkennast av myndugleikunum, bæði fyri trygdina og fyri at teir kunnu nýta eitt góðskustempul í marknaðarføringini.

Uppgáva er áløgd Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og Visit Faroe Islands at gera greiningararbeiðið viðvíkjandi góðkenningarskipan og hvør myndugleiki skal taka sær av hesum. (Uttanríkis- og vinnumálaraðið 2017).

Mælt verður til, at henda skipan kemur í lag skjótast gjørligt. Tá hon er til reiðar, verður mælt til, at ferðasmiðir í Tórshavnar kommunu, sum bjóða út váðakendar upplivingar, skulu verða góðkendir.

**FERÐALEIÐARAR:**
Ferðaleiðarar, sum bjóða út túrar gjøgnum Visit Tórshavn, skulu hava tikið útbúgving ella ferðaleiðaraskeið. Eisini er umráðandi, at ferðaleiðarar hava fyrstuhjálparskeið.

Dygdin skal vera í hásæti, bæði innan kunningarpartin og viðvíkjandi tænastustigi. Tað er umráðandi, at fylgt verður við, um nóg mikið av ferðaleiðarum eru og hvussu støðið er. Hetta øki skal raðfestast, og um neyðugt átøk setast í verk.

Eitt dømi kundi verið, at ein síða verður gjørd á Visit Tórshavn við heitinum „ferðaleiðarar og gongutúrar“. Á síðuni hava ferðaleiðarar eina vangamynd við upplýsingum um: royndir, aldur, málførleikar, servitan, hvar túrar kunnu bjóðast út og nær ferðaleiðarin er tøkur o.s.fr. Á henda hátt kunnu ferðafólk velja túrar júst innan síni áhugamál. Hetta kann eisini gera, at lætt er at fylgja við eftirspurninginum, og møguliga eggja fleiri fólkum at starvast sum ferðaleiðarar.

**BYGDA- OG VARÐAGØTUR:**
Tað er ábyrgdin hjá kommununum í landinum at taka sær av bygda- og varðagøtum, herundir at tekna og merkja gøturnar upp og tryggja, at trygdin er í hásæti (Uttanríkis- og vinnumálaráðið 2017).

Tað er frítt at ganga á bygda- og varðagøtum í Føroyum, og nógv ferðafólk nýta høvið at síggja náttúruna á henda hátt. Av tí at fleiri av varðagøtunum verða so nógv nýttar, sæst tað aftur í sambandi við ringt gonguundirlag, móru o.s.fr. Tað vindur ikki minst upp á seg við gongutúrum við ferðafólkum, sum koma við ferðamannaskipunum. Tey koma í stórum bólkum, sum leggja eyka trýst á gøturnar.



- Kommunan arbeiðir regluliga við at viðlíkahalda gøturnar. Tó verður mælt til støðugt taka atlit til økta ferðafólkatalið og stóra trýstið á ymsu gøturnar.
- Kommunan hevur tørv á øðrum væl uppmerktum gongugøtum at velja í, ikki minst til cruiseferðandi, tí tey eru ofta nógv í tali, eru møguliga ikki so væl gongd, og nógv eru komin upp í árini.
- Í sambandi við gøtuna til Kirkjubøar er sambært vinnuni neyðugt at umhugsa, um hon er til øll ferðandi ella til teirra, sum eru von at ganga á ringum lendi.
- Aðrar gøtur, sum eru væl egnaðar/merktar, mugu marknaðarførast m.a. fyri at lætta um trýstið á verandi gøtur.
- Gøturnar skulu merkjast, so fólk kenna seg trygg og ikki villast ella fara av gøtunum, og fyri at minst møguligt slit skal síggjast í náttúruni. Hetta kann gerast bæði fysiskt og talgilt.
- Har tað er neyðugt, skal skelti setast upp, har gøtan byrjar, við viðkomandi kunning so sum longd á teinum, hædd o.o. viðkomandi kunning um gongugøtuna.
- Sum áður nevnt skal alt, sum fevnir um skelting í kommununi, gerast á ein hátt, so javnvág er ímillum tað mest neyðuga og tað autentiska.

# Ferðavinna úti á Reyni

Tá ferðafólk eru í Tórshavn, er tað eitt „must see" at vitja gamla býarpartin úti á Reyni. Hetta sæst aftur í ferðafólkatalinum, sum seinastu árini er vaksið sera nógv, og serliga sæst tað aftur á smáum økjum sum úti á Reyni. Ferðafólkini koma ofta í stórum bólkum (50-100) fólk, og hetta kann vera til ampa bæði hjá íbúgvum og fyri gøturnar, sum slítast. Vaksandi ferðavinna skal koma øllum til góðar, og tí er umráðandi at skipa ferðavinnuna í økjum, har nógv ferðafólk koma.

Mælt verður til, at arbeiðið at menna økið úti á Reyni fer í gongd sum skjótast. Gøturnar skulu viðlíkahaldast og faldari og skelti gerast, sum kunna ferðafólk um, hvussu tú ber teg at úti á Reyni. Ofta vita ferðandi ikki, at fólk eru búsitandi har, men síggja tað meira sum eitt savn.

Eitt ella tvey umboð skulu finnast millum reynabúgvar, sum kommunan kann samskifta við.

Hetta sama átak skal eisini gerast aðrastaðni í kommununi, har tey uppliva ella fara at uppliva somu avbjóðing, eitt nú í Kirkjubø.







20

# Almennir hentleikar

Vaksandi ferðafólkatal økir tørvin á øktari raðfesting av almennum hentleikum so sum ruskspannum og vesum. Royndir úr øðrum býum vísa tó, at loysnin ikki er at økja talið av ruskspannum, tí hetta kann skjótt gera, at burturkastið verður meira sjónligt. Heldur skulu ruskspannir gerast størri og tømast oftari, serliga í summarhálvuni og á støðum, har nógv fólk eru. Kommunan arbeiðir við hesum málinum. Fyri at minka um burturkast í náttúruni eigur at verða kunnað um, hvar ruskspannir eru, og sjálvsagt verður álagt øllum at taka burturkast við sær og ikki dálka náttúruna.

Neyðugt er, at fólk altíð hava atgongd til almenn vesir, og hesi mugu vera opin eftir tørvi. Støða skal takast til, um og hvar fleiri vesir skulu setast upp.

Neyðugt er at hava vaksandi ferðavinnuna í huga í sambandi við almennar hentleikar. Støða skal takast til, um tað er neyðugt við fleiri vesum, og hvar hesi skulu staðsetast. Fylgjast skal við, um tað er neyðugt, at ruskspannir skulu tømast oftari, serliga í summarhálvuni. Kannast skal sostatt fyrst, hvør tørvurin er.

# Mentan í fokus

Kommunan er ríkað við nógvari ymsari mentan og list, tónleiki, sniðgeving, gastronomi, søgu o.s.fr. Norðurlandahúsið, kirkjur, Listasavn Føroya, Østrøm, fornminnissøvn og matstovur í høvuðsstaðnum gera øll sítt til at seta okkara mentan í fokus.

Sonevndu „culture lovers“ ferðafólkini vitja nógv av omanfyri nevndu mentanarstøðum. Tó eru tølini av vitjandi ofta sera ymisk á teimum ymsu støðunum, og royndir vísa, at jú nærri býarmiðjuni hesi støð eru, jú fleiri vitjandi koma.

Møguleikin skal kannast, um hølir eru, sum høvdu hóskað til at nýta sum savn. Kannast skal, hvussu eitt tílíkt savn kundi sæð út, og hvat hetta skuldi fevnt um. Mentanartilboð skulu eyðmerkjast, so hesi er løtt at finna.





22



# Matmentan

Matur og ferðing hoyrir uttan iva saman. Ein stórur partur av at fara út og uppliva eitt nýtt ferðamál er ikki einans at njóta merkisstøðini, men í líka stóran mun at smakka alt tað, ferðamálið hevur at bjóða, og á tann hátt fáa eina ítøkiliga uppliving inn á kroppin.

Matgerð hevur seinastu árini fingið størri og størri áhuga í útheiminum. Hetta sæst á tí vaksandi mongdini av sjónvarps-sendingum, har matur á ein ella annan hátt er í fokus. Hetta hevur ført við sær ein natúrliga vaksandi áhuga fyri mat-ferðavinnu kring heimin.

**MATMARKNAÐUR:**
Kommunan skal skapa karmar, soleiðis at føroyingar kunnu selja mat og aðrar føroyskar serlutir til ferðandi og føroyingar, t.d. leygardagar ella sunnudagar í miðbýnum, tá tey flestu, bæði føroyingar og ferðandi, taka sær av løttum. Hetta skal gerast á ein einfaldan hátt, so lætt er at seta upp og pakka niður við t.d. at nýta ídnaðartjøld, eins og tjøldini, ið verða nýtt til tiltakið „Ein dagur á grynnuni". Um undirtøka frá virkandi er til tess og hetta roynist væl, er eyðsæð, at hetta verður ein fastur táttur í summarhálvuni. Fokus skal ikki einans vera á óviðgjørdan mat, men eisini skapar hetta eitt høvi at fáa teir gomlu rættirnar fram aftur, til dømis knettir, drýl, køkur, rullupylsu, ost og annað, sum hevur føroyskan uppruna ella er gjørt úr føroyskum rávørum.

**MARKNAÐARFØRING AV MATUPPLIVINGUM:**
Henda nissja er ein týdningarmikil málbólkur fyri ein og hvønn høvuðsstað. „Gastro ferðandi" spjaða ofta sínar upp-livingar til vinir, kenningar og onnur bæði umvegis alnetið og munn til munn, og eru hesi tí sjálvsagdir ambassadørar fyri Tórshavn og okkara føroysku matmentan. Avbjóðingin er at fáa henda málbólk at steðga longur, og tí er umráðandi, at marknaðarføringin vísir á, at Tórshavnar kommuna er tann „ultimativi" miðdepilin í Føroyum innan útboð og góðsku av mattilboðum. Kommunan skal tí arbeiða sera tilvitað um hetta serliga „produktið" til gastroferðafólk. Til dømis hava vit dagar sum „ein dagur á Grynnuni" og „Slaktið", sum eru eyðsæð tiltøk at marknaðarføra uttanlands. Bæði tiltøkini eru serliga væl dámd millum føroyingar og ferðandi, sam-stundis sum tey bæði liggja uttan fyri háárstíðina. Við oman-fyri nevndu dømum kunnu hesi nýtast sum íblástur til smærri matupplivingar at halda í høvuðsstaðnum gjøgnum summarið fyri eisini at fanga og kveikja áhugan hjá teimum ferðandi í háarstíð.

# Tiltøk – events

Visit Tórshavn, Tórshavnar kommuna og virkandi í vinnuni á staðnum hava seinastu árini skipað fyri nógvum hágóðskutiltøkum, sum megna at savna saman nógv fólk og ferðafólk í býnum. Nevnast kunnu Mentanarnáttin, Jól í miðbýnum, Vetrarljós, Tórshavn Marathon, Voxbotn, Ein dagur á grynnuni, Slaktið v.m.

Hesi tiltøk hava nógv at siga fyri trivnaðin hjá borgarum, men eru eisini áhugaverd hjá ferðafólkum.

Mælt verður til, at tiltøk framhaldandi verða raðfest og eiga framhaldandi at spjaðast gjøgnum alt árið. Dentur skal tó eisini leggjast á at skipa fyri nýggjum tiltøkum, sum kunnu fáa ferðafólk til býin, eisini í lágárstíð.

Mælt verður til, at kommunan skapar røttu karmarnar, soleiðis at samskipan av tiltøkum frameftir verður raðfest og liggur í eini tryggari fastari legu.





TÓRSHAVNAR KOMMUNA